ÚTVARPIÐ

Týsdagur 10. juni

09.30 **Snæbjørn**
23. partur av skaldsøgu eftir Eilif Mortansson. Hans Thomsen týður og lesur
11.01 **Tær tøta og práta**
4. sendingin úr førysku niðursetubygdini Hirtshals.
Jóhann Mortensen leggur til rættis
12.55 **Føroyski skipalistin**
19.00 **Barnaútvarpið**
Oddvá Nattestad skipar fyri
19.30 **Úr plátusavninum**
Símun úr Konoy velur løgini
20.05 **HM-fótbóltur í Mexico**
20.55 **Veðurtíðindi**

Mikudagur 11. juni

09.20 **Frítíð og náttúra**
Jóhann Mortensen leggur til rættis
11.01 **Kvøduljómar til sjófólkið**
19.00 **Inniluftssjúka ella ovurviðkvæmi**
Bogi Godtfred leggur til rættis
19.30 **Løg mær dámar**
åHeðin Thomsen velur løgini
20.00 **Veðurtíðindi og tíðindi**
20.05 **HM-fótbóltur í Mexico**
20.55 **Veðurtíðindi**

Hósdagur 12. juni


09.30 **Inniluftssjúka ella ovurviðkvæmi**
Bogi Godtfred leggur til rættis
10.05 **Fyrrapartsløg**
Jákup Magnussen velur løgini
11.01 **Manna 10 nótabátar í Hirtshals**
5. sendingin úr føroysku niðursetubygdini Hirtshals.
Jóhann Mortensen leggur til rættis
19.00 **Snæbjørn**
24. partur av skaldsøgu eftir Eilif Mortansson. Hans Thomsen týður og lesur
19.30 **Variatiónir yvir Lennon og McCartney**
Tónleikasending hjá Janusi Petersen
20.00 **Veðurtíðindi og tíðindi**
20.05 **HM-fótbóltur í Mexico**
20.55 **Veðurtíðindi**

Fríggjadagur 13. juni

09.30 **Løg mær dámar**
Heðin Thomsen skipar fyri
10.05 **Fyrrapartsløg**
Jákup Magnussen velur løgini
11.01 **Sjómansstovan Malta**
6. sendingin úr førysku niðursetubygdini Hirtshals.
Jóhann Mortensen leggur til rættis



19.00 **HM-fótbóltur í Mexico**
Samsending við danska útvarpið frá dystinum millum Danmark og Vesturtýskaland
21.00 **Veðurtíðindi og tíðindi**



Europa er stórt, og mong eru londini. Fert tú á Interrail kanst tú ferðast, sum tú sjálv vilt, í ein mánaða.

Sunnudag kl. 17.50

Á ferð við Interrail

Pengarnir eru oftast ikki so nógvir hjá ungum fólki, so tey bara kunnu fara inn á nærmastu ferðamannastovu og keypa sær ein ferðaseðil. Sparast má í longri tíð, og kortini er torført at fáa ráð.

Ein møguleiki hjá ungum er tó Interrail. Tað eru meira enn 15 ár síðani, at hendan skipan varð sett á stovn. Jarnbreytarfeløgini í teimum europeisku londunum hava gjørt eitt sáttmála, sum loyvir ungum fólkum at ferðast so nógv tey vilja, og hvar tey vilja, fyri eina avmarkaða upphædd.

Birita Mohr fer í hesari sending at tosa við umboð fyri LFÚ-ferðir, sum tykist hava fingið alt størri undirtøku seinastu tíðina. LFÚ-ferðir royna at skipa soleiðis fyri, at serliga ung sleppa so biliga sum møguligt út at ferðast. M.a. royna tey at fáa í lag avsláttarskipanir so nógva staðni sum gjørligt.

Birita Mohr fer eisini at tosa við eina unga gentu, sum hevur verið á Interrail. Hon greiðir frá, hvussu ein tílík ferð kann leggjast til rættis, og hvørjir trupulleikar kunnu vera.

Morgunlestrar

9. til 14. juni '86

Gunnar Reynslág, Argir, lesur

Mánadag 9. juni
nr. 12 »Lit allar tínar leiðir«
fyri lestur vers 1-3,
eftir lestur vers 4-6.

Týsdag 10. juni
nr. 13 »Vár Gud er føst og haldgóð borg«
fyri lestur vers 1 & 2,
eftir lestur vers 3 & 4.

Mikudag 11. juni
nr. 402 »Hvørja hugsan og hvørt orð«
nr. 384 »Lagnan er ei at líta á

Hósdag 12. juni
nr. 173 »Vár Gud, sum býr í himli háum«, vers 1
nr. 350 »Faðir, fylg mær henda dag«

Fríggjadag 13. juni
nr. 279 »Gud faðir meg vara«
nr. 224 »Hvat best mær tóvar«

Leygardag 14. juni
nr. 25 »O faðir, goym meg við tín favn!«
nr. 271 »Ofta tungt er mansins hjarta«

Týsdag kl. 19.00

Barnasending

Oddvá Nattestad hevur hesa ferð verið í Vági, har hon vitjar ein 3. flokk. Vit verða víst runt í Vági, eins og vit komu har til á fyrsta sinni. Næmingarnir hava skipað soleiðis fyri, at ein teirra spælir Antonia — høvuðspersónurin í barnabókunum eftir Ebbu Hentze — sum vísir hinum, ið eru komin hagar at vitja, runt á oynni. Oddvá tosar so seinni við næmingarnar júst um bókurnar hjá Ebbu. Við í sendingini eru eisini upptøkur av tónleiki, har onkrir av næmingunum spæla.

Barnasendingarnar detta ikki burtur imillum í summar. Tá ið Oddvá fer í summarfrí, tekur Bjørgfinnur Nielsen, lærari, við.



Ebba Hentze, rithøvundur, hevur skrivað søgurnar um Antoniu. Í barnasendingini týsdagin tosar Oddvá við nøkur børn í Vági um bókurnar